Faroe Petroleum spennir seg út á Atlantsmótinum:

160 mill. kr. aftrat í eginpeningi

Fríggjadagin 27. Juni varð Faroe Petroleum skrásett á AIM virðisbrævamarknaðinum í London. Faroe Petroleum er holdingfelag hjá Føroya Kolvetni, ið sostatt hevur rokkið einum av sínum málum – at verða skrásett á einum altjóða virðisbrævamarknaði. Stórur áhugi er fyri at seta váðafúsar kapital til í sambandi við framtíðar virksemi hjá oljufelagnum

TÍÐINDASKRIV

Graham Stewart, nevndarformaður í Føroya Kolvetni og stjóri í Faroe Petroleum hevur við drúgvu royndum sínum á oljuøkinum megnað at skapa stóran áhuga fyri virkseminum hjá feløgunum. Nú verður av álvara sett út í kortið á Atlantsmótinum

Mynd Jens K Vang

- Í hesum sambandi varð partapeningurin hjá Faroe Petroleum hækkaður, og felagið hevur fingið £ 15 mill. (kr. 160 mill.) afturat í eginpeningi við at selja 14.492.754 partabrøv áljóðandi 10 pence (kr. 1,06) fyri 103,5 pence (kr. 11,00) hvørt partabrævið. Henda hækkan kemur bert 6 mánaðar eftir, at felagið seinast hækkaði eginpeningin við £ 7 mill. (kr. 75 mill.). Síðan Føroya Kolvetni varð skrásett í 1998 eru fingnar til vega umleið kr. 240 mill. til leitivirksemi.

- Ætlanin er framvegis at arbeiða á øllum Atlantsmótinum, har felagið longu hevur stór áhugamál á føroyskum og enskum øki:
  - Felagið eigur 25% í leitiloyvinum 002 á føroyskum øki, har borað verður í løtuni
  - 25% í leitiloyvi 005 á føroyskum øki, har ymsar kanningar eru gjørdar
  - Ætlanin er eisini at taka lut í tí komandi føroysku útbjóðingini.

- Á enskum øki eru tvey loyvi eisini keypt, ið bæði liggja tætt við føroyska markið:
  - 17.5% av Suilven økinum (204/14 og 204/15), har olja og gass longu eru funnin og
  - 20% av Laggan økinum (206/1a), har gas er funnið.
  - Arbeitt verður við ætlanum um at útbyggja økini til framleiðslu.

- Ætlanin var frá byrjan at skráseta Føroya Kolvetni á virðisbrævamarknaðinum í London; men føroyska og enska lógarverkið, roknskaparreglur, skatt- og gjaldoyraviðurskifti samsvaraðu ikki nóg væl til, at nýggir partaeigarir føldu seg tryggar. Tí varð í desember mánaða 2002 eitt enskt partafelag, Faroe Petroleum, sett á stovn sum holdingfelag hjá Føroya Kolvetni. Hetta felagið hevur skrivstovu í Aberdeen. Allir partaeigarar í Føroya Kolvetni hava fingið tilboð um at býta síni partabrøv um við partabrøv í Faroe Petroleum, so at Faroe Petroleum fer at eiga 100% av Føroya Kolvetni, og partaeigararnir í Føroya Kolvetni fara at eiga partabrøv í felagnum Faroe Petroleum.

- Hjá Faroe Petroleum og Føroya Kolvetni starvast 4 fólk, meðan 3 starvsfólk eru knýtt at feløgunum til ávísar uppgávur. Nevndarformaður í Faroe Petroleum er Joe Darby, sum var stjóri hjá Lasmo, ið var virkið á føroyskum øki, til felagið var selt til ENI. Joe Darby hevur drúgvar royndir innan altjóða oljuvirksemi. Hinir nevndarlimirnir eru Nils Sørensen, Meinhard Jacobsen og Graham Stewart, sum eisini er stjóri í felagnum.

- Nevndarformaður í Føroya Kolvetni er Graham Stewart, ið eisini hevur drúgvar royndir innan altjóða oljuvirksemi. Hinir nevndarlimirnir eru Olaf Olsen, Meinhard Jacobsen og Nils Sørensen, ið eisini er stjóri í felagnum.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Nils Sørensen tlf. 210451.



Faroe Petroleum ætlar sær at vera sera virkið á øllum Atlantsmótinum tvs. bæði í føroyskum og bretskum øki. Umframt at eiga 25% lut í báðum loyvunum hjá ENI (Agip) á føroyskum øki tvs. loyvinum 002 og 005, hevur felagið eisini keypt seg inn í spennandi loyvi hinumegin markið, Laggan sum er eitt gassfelt og Suilven, sum er eitt oljufelt og sum fer undir framleiðslu møguliga í næsta ár

TILTØK

Hebron, Argir
Í kvøld kl. 20 verður bønar- og uppbyggingarfundur, Páll Poulsen talar. www.hebron.fo

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í morgin kl. 14 Brúðarvígsla. Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn. www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Helgu og Hjørleif Gaard í Kollafirði.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hanus Simonsen.

Ebenezer
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.ebenezer.fo

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Møti.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Samkoman Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Ætlanin er fara útferð sunnudagin, lýst verður nærri á heimasíðuni, www.livdin.fo

Saron, Vestmanna
Mikudagin kl. 21 Útimøti á Torginum, opið hús í Saron aftaná. Telefonandaktin 424741.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 19 Møti við Egil Toftegaard o.fl.
Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bibliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa í kvøld kl. 19.30, Klæmint Eliasen talar. Evni: Teir mugu berast (Esajas kap. 46). Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð
Um víðarar verður útimøti í kvøld kl. 20.45.
Møti verður í fimleikarhøllini í Glyvra Skúla leygarkvøldið kl. 20 við Hans Berndtsen.
Sunnudagin verður møti kl. 19.
Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 21 Útimøti við skýlið.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Spælifacé.
Sunnudagin kl. 11 Møti við André Matras (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Mikudagin kl. 20 Bibliutími. Øll eru vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.
1. juli byrjar Jórunn D. Poulsen at arbeiða í Tilhaldinum. Kl. 15 verður móttøka í Tilhaldinum.
Konsert fríggjadagin 4. juli kl. 15 við Irving Anckers Sekstet. Irving Anckers Sekstet spældu í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn í 50-unum. Aftaná fimti ár, er orkestrið aftur samla. Orkesterið spæli tey somu góðu løgini.
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhaeddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Tilhaldið í Sandoynni
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vit fara í summarfrí frá 1. juli til 1. september.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Sporafundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarblað til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

LISA
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25, 6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyskt felag í Ballerup
Ryttergården, Pederstrup 2750 Ballerup

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir: mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur: radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða: www.radgevingin.dk

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B, tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis: Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Asbjørn Reines, tlf. 55229049.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail address: postur@faroehouse.dk
Heimasíðan: www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elín S. Wang, Melabraut 8, 170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

PRÓGV

26. juni tók Johnny í Grótinum prógv sum búskaparfrøðingur (cand.polit) á Københavns Universitet.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Mikudagin	02.07.	kl. 20[00]
Mikudagin	02.07.	kl. 22[30]
Hósdagin	03.07.	kl. 20[00]
Hósdagin	03.07.	kl. 22[30]



Mikudagin	02.07.	kl. 23[00]
Hósdagin	03.07.	kl. 23[00]



Mikudagin	02.07.	kl. 18[30]
Mikudagin	02.07.	kl. 20[45]
Hósdagin	03.07.	kl. 18[30]
Hósdagin	03.07.	kl. 20[45]

KOMANDI FILMUR



Frumsýning
Fríggjadagin 04.07.

P BIO P
KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu